lívdin
- í lívd hins hægsta

November 2009



# Yvir 4000 skógvaeskjur



*Tórvør Vang og Erling Bech við skógvaeskjum.* *Mynd: Elisabet Vang*

Sunnudagin 25. oktober var seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child-tiltakið í Føroyum. Eskjurnar vórðu pakkaðar hjá Faroe Ship, og tilsamans 4060 skógvaeskjur vórðu sendar av landinum í mun til 3300 eskjur í fjør. Í ár verða eskjurnar latnar til børn í Rumenia.

Umleið 50 áhugabólkar kring landið hava verið við til at savna inn skógvaeskjur til tiltakið bæði samkomur, kirkjur, skúlar og onnur. Til dømis var Tilhaldið í Tórsgøtu eisini við í tiltakinum.

Tá eskjurnar koma fram, verða tær í samstarvi við kirkjur, samkomur, skúlar og vælgerandi felagsskapir á staðnum latnar børnum á sjúkrahúsum, barnaheimum, flóttafólkalegum, býlum fyri heimleys og í fátækrabýlingum.



## At seta sær fyri



Hesin setningurin omanfyri tykist at vera felagsnevnari fyri nógv av tí, vit sum samkoma hava havt frammi hesa seinastu tíðina. Vit hava tosað nógv um dreymar, visiónir og endamál. Vit hava tosað nógv um nýggja bygningin og eggjað hvør øðrum at seta okkum fyri at taka á okkum størri fíggjarliga ábyrgd, soleiðis at bygningurin kann gerast veruleiki.

Ein tann vakrasta frásøgnin í Bíbliuni um hetta at seta sær fyri er frásøgnin um Dániel. Tað stendur at "Dániel setti sær fyri, at hann skuldi ikki gera seg óreinan við mati kongsins....".

Tað er eggjandi lesnaður at fylgja hesum unglinga, sum tók støðu fyri Gudi og helt seg til hesa støðu ígjøgnum alt sítt lív.

Ímeðan eg skrivi hesar reglur, lata seks ung fólk í Lívdini seg doypa. Tey hava øll sett sær fyri at fylgjast við Jesusi. Eg kenni meg eggjaðan til støðufesti.

*Jóhan Syderbø*

# Vinir í Lívdini

## Dópur

Týskvøldið 27. oktober var dópur í Hebron á Argjum, har seks ung úr Lívdini vórðu doypt. Tey vóru: Rasmus Hammer (sonur Marianne og Ingmar), Gunnvá Djurholm (dóttir Duritu og Paula), Hanus Krett Hansen (sonur Heidi og Kim), Silja Wang (dóttir Elin og Jens), Jákup P. Olsen (sonur Karin og Paula) og Jónas Højgaard (sonur Lis og Rúna).



*Dávid og Jógvan*

## Til lukku við barninum



*Hallur og Shino við lítlu Kano*

15. september fingu Shino og Hallur Mortensen, Glasgow, eina dóttur, sum hevur fingið navnið Kano Mortensen. Familjan kemur eftir ætlan til Føroyar í november og steðgar í umleið hálvt ár.

Fríggjadagin 16. okt. bleiv Dávid stóribeiggi, tá hann fekk lítlabeiggjan Jógvan, sum er føddur tann 17. februar 2009. Báðir eru úr Suðurkorea. Foreldrini eru Jóna og Dánjal Jóhan Thomsen.

12. oktober fingu Barbara og Sámal Joensen í Streymnesi eina dóttur. Hona var 56 cm long og vigaði 4.400 gr.

12. oktober fingu Alice og Óli Mortensen tvíburar – tvær gentur. Onnur var 51 cm long og vigaði 2.320 gr, meðan hin var 47 cm long og vigaði 1.800 gr.





## Frelsunarherurin 85 ár



Um vikuskiftið 23.- 25. oktober varð hátíðarhildið, at Frelsunarherurin hevur virkað í Føroyum í 85 ár. Hátíðarhaldið var bæði í Eysturskúlanum og í Frelsunarherinum í Tórsgøtu.

Leygardagin var vígsla av nýggja Herberginum við Dalavegin, sum byrjaði við samkomu í Frelsunarherinum. Síðan varð gingið í skrúðgongu niðan á Dalaveg 1, har heimið varð vígt.

Nógv fólk vóru komin til hátíðarhaldið, m.a. leiðslan í Frelsunarherinum í Norra og hornorkestur Frelsunarhersins úr Valby í Keypmannahavn.

## Danska Biker Bíblian endurprentað




Sunnudagin 11. oktober vitjaði Victor Carlsen frá motorsúkkluklubbanum "Cross-Bikers MC Føroyar" í Lívdini í sambandi við, at 3. upplag av donsku Biker Bíbliuni nú er ávegis og væntandi kemur út tíðliga í komandi ári.

Teir kristiligu donsku MC-klubbarnir hava staðfest, at núverandi upplag upp á 10.000 eintøk er við at vera uppi. Tað hevur víst seg, at tørvurin á Biker Bíblium er sera stórur. Eisini tann fíggjarligi tørvurin er stórur, umleið 200.000 krónur, við tað at hvørt eintakið kostar 20 krónur at prenta. Fleiri upplýsingar eru á heimasíðuni: bikerbibel.dk, og har ber eisini til at stuðla tiltakinum fíggjarliga.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 3. nov. | Høvi at luta visiónir og dreymar |
| 10. nov. | Húsbólkar |
| 17. nov. | Høvi at luta visiónir og dreymar |
| 24. nov. | Høvi at luta visiónir og dreymar |

## Gloymdir lutir

Tá lutir verða gloymdir í Hoyvíkar Skúla, verða teir annaðhvørt koyrdir í ein hvítan kassa hjá Lívdini, sum stendur við "borðið", ella, um skúlin finnur lutir, verða teir koyrdir í glasskápini í skúlanum. Um onkur saknar eitthvørt, kann tað vera, at skúlin hevur tað liggjandi.

## Lívsdroparnir

Mánadagin 19. oktober byrjaðu Lívsdroparnir aftur í hølunum á Brekku. Lívsdropar eru mánadag kl. 16.45 og eru fyri børn úr 1. til 7. flokk.

Hevur onkur møguleika og áhuga í at rætta eina hjálpandi hond í sambandi við tiltakið, kann viðkomandi seta seg í samband við Poulu Sørensen (tlf. 220429) ella Onnu Mariu Anthoniussen (tlf. 228826).

## Kæmp for kærligheden




Nakrar bøkur "Kæmp for kærligheden" eru til sølu. Hetta eru bøkur, sum vanliga verða seldar á PREP-skeiðnum. Prísur 300 kr. Áhugað kunnu venda sær til Duritu Djurholm tlf 316099/230833 ella prep@livdin.fo

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

## Sunnudagin 1. november



Absalon

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Absalon Áargarð og Jógvan Zachariassen*
*Evni: Ert tú við í tænastu?*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir – samkoman í samfelagnum (2)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*
** Innsavning til nýggja bygningin*



Jógvan

## Sunnudagin 8. november

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Visiónir - Guds fólk*
*Talari: Poul Guttesen*
** Einki møti kl. 12*



Poul

## Sunnudagin 15. november

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Leivur og Marita Guttesen og Jóhan Jacobsen*
*Evni: Grønlandstúrurin og Kinatúrurin*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Opið evni*
*Talari: Símun Pætur á Torkilsheyggi*



Leivur og Marita

## Sunnudagin 22. november

Familjumøti kl. 10.30: *Heiti stólurin: Hvat droymir tú um?*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Opið evni*
*Talari: Gunnar Nielsen*



Símun Pætur

## Sunnudagin 29. november

Familjumøti kl. 10.30: *Heiti stólurin: Hvat droymir tú um?*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir – týdningurin av at geva*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Gunnar

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*